gult cyan magenta svart



# Opnir møguleikar

**Hósdagin letur Kári Svensson (f. 1954) upp listaframsýning við Snarskivuna í Havn. Hetta er nýggja avreiðslu- og framsýningarhølið hjá Tórshavnar Býráð í miðum býi, har sum gamla posthúsið var.**



Áður hava Amariel Norðoy og Eyðun av Reyni sýnt fram í hesum somu hølum.

Kári, sum hevur ateliér í gomlu bommfabrikkini hjá Frants Restorff, sýnir nú fram eina røð av nýggjum málningar, har hann sum vant nýtir olju á lørift. Í tali verða teir einir 14-16.

Kári var millum tey fimm føroysku listafókini, sum fyri jól sýndu fram í New York.

Í tiltiknu listabókini, sum fútabann varð sett fyri, sigur Bárður Jákupsson um Kára Svensson, at hann »roynir seg fram við myndamáli sínum, framburðurin broytist frá framsýning til framsýning, og mangir møguleikar standa opnir. Tey seinastu árini er ein gongd ímóti abstraktum litsamansetingum«.

Tann sannroynd at Kári ferðast nógv í náttúrini, mangan við tráðu, sæst stundum aftur í málningunum. »Innliving í landslagið er týdningarmikil fortreyt fyri málningunum« verður sagt í myndlistabókini, sum Sosialurin í heyst skýrdi ársins bók.

Myndirnar hjá Kára »byggja á náttúruupplivingar, linjur og strikur sipa til hús, gøtur og fólk. Flótandi skapleysir formar og rørslur kunnu ímynda sveimandi hamrar ella líðir« sigur Bárður Jákupsson um Kára Svensson í bókini »Myndlist í Føroyum«, sum forlagið Sprotin gav út í fjør.

Nú næmingar í elstu flokkum fólkaskúlans eru í praktikk, hevur Lena Maria Ellingsgaard úr 9.a í Venjingarskúlanum valt starvstovuna hjá Kára sum praktikkpláss. Eitt áhugavert skeið, sum endar, tá vikan er úti.

Tá Kári Svesson hósdagin klokkan 15 letur upp, fara musikkskúlanæmingar eisini at spæla.


SJÓVINNUFYRISITINGIN

LØGFRØÐINGUR TIL SJÓVINNUFYRISITINGINA

Sjóvinnufyrisitingin, ið er deild í Fiskimálastýrinum, umsitur løgtingslóggávu innan sjóvinnu, sum er: Manningarlógin - Sjómanslógin - Mynstringarlógin - Skipaskrásetingarlógin, FS og Føroyska Altjóða Skipaskrásetingarlógin, FAS.

Sjóvinnufyrisitingin hevur eisini til uppgávu at viðgera og ummæla ríkislógir innan sjóvinnu, sum ætlanin er at seta í gildi í Føroyum.

Fyri at at menna bæði lóggávu og fyrisiting til ein vaksandi tørv á tænastum, søkja vit eftir løgfrøðingi til Sjóvinnufyrisitingini.

Starvið
Høvuðsuppgávan hjá løgfrøðinginum verður at veita løgfrøðiliga ráðgeving og at umsita og hava løgfrøðiliga málsviðgerð innan sjóvinnumál.
Eisini kemur viðkomandi at hava ábyrgd av at umsita skipaskrásetingarlógirnar FS og FAS og at gera Føroysku Altjóða Skipaskránna FAS sjónliga, serliga uttanlands.
Høvi verður hjá løgfrøðinginum at seta seg inn í millumlanda sáttmálar innan sjóvinnu, eitt nú innan ST-felagsskapirnar IMO og ILO og at umboða Føroyar, saman við Danmark, í hesum felagsskapum. Viðkomandi skal eisini kunna átaka sær aðrar uppgávur innan fiskivinnuøkið í Fiskimálastýrinum.

Førleikakrøv
Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur:
· løgfrøðiliga útbúgving
· góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál
· góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
· góð samstarvsevni og evni at fyriskipa
Tað er ein fyrimunur at hava starvsroyndir innan økið.

Setanarviðurskifti
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkis-felag. Setanarøkið er Fiskimálastýrið, og stovnar undir tí, umframt onnur aðalstýrir og løgmansskrivstovuna.

Umsóknarfreist
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi 1. februar 2001.

Umsóknir skulu sendast til:
Sjóvinnufyrisitingin
Postsmoga 347
110 Tórshavn

Nærri upplýsing um starvið fáast við at ringja til Sjóvinnufyrisitingin, á tlf. 313669 og tosa við Eyðun Berth Jacobsen, deildarstjóra.

SJÓVINNUFYRISITINGIN - Yviri við Strond 19 - Postsmoga 347 FO 110 Tórshavn - Telefon 31 36 69 - Telefax31 36 14 - E-mail: sjovinnu@sjovinnu.fo

STEPHANSSONS HUS.FO


**VIÐMERKINGAR**

# Opið bræv

Er sent Strandfaraskipum Landsins, Sosialinum, Dimmalætting, Oyggjatíðindum og Útvarpi Føroya.

### Næmingarnir á Miðmánsskúlanum

Næmingarnir á Miðnámsskúlanum vilja hervið gera vart við sína ónøgd v.v. teimum út av lagi ringu næmingaflutningsumstøðunum, sum eru í hesum døgum í Suðuroynni.

Í fleiri morgnar hava næmingar staðið eftir á busssteðgistøðunum runt um í oynni orsakað av at Strandferðslan ikki røkir sína skyldu. Tað hava verið royndir gjørdar at fáa hýruvognar at flyta næmingarnar í skúla, men hevur hendan alternativa loysnin ikki klárað at nøkta tørvin.

Tað, vit eru so ónøgd við, er, at næmingarnir, ið ikki sleppa í skúla, missa týdningarmiklar tímar og verða skrivað fyri fráveru, hóast tey vóru møtt til bussin. Vit, næmingarnir, hava eitt krav uppá at sleppa í skúla og kunnu ikki góðtaka hetta.

Vit gera vart við at í morgin, 10.01.2001, fara eingir næmingar í skúla. Soleiðis verður hildið fram, til vit kunnu vissast um, at *allir* næmingarnir kunnu flytast aftur og fram í skúla.

# TRYGD styrkir kapital-grundarlagið

**P/F TRYGD - Nevndin**

*Tórshavn tann 10. jan. 2000*

Tryggingarfelagið P/F TRYGD víðkaði í oktober 2000 sítt virkisøki til eisini at umfata sjótryggingar. Tiltakið hevur verið væl móttikið av vinnuni, og TRYGD hevði við ársenda 2000 yvirtikið tryggingina av fleiri av teimum størru skipunum í fiskiflotanum. Hetta má metast at vera sera nøktandi.

Orsakað av hesum og við atliti til í enn størri mun at styrkja støðu felagsins á tryggingarmarknaðinum, avgjørdi aðalfundurin í TRYGD tann 21. des. 2000 at hækka kapitalgrundarlagið í felagnum við 60 mió. kr., og er eginognin í felagnum eftir hetta 110 mió. kr.

Kapitalgrundarlagið er sostatt fult nøktandi til, at TRYGD, saman við sínum endurtryggjarum, kann tryggja sjálvt tey størstu skipini í flotanum, eins og tað annars í øllum førum vil styrkja kappingarførið hjá felagnum.

# Skeið í kór- og orkesturleiðslu

Sum lýst aðrastaðni í blaðnum í dag skipar Kórsamband Føroya fyri dirigentskeiði í sangstovu Kommunuskúlans vikuskiftið 9.-11. februar.

Skeiðið er fyrst og fremst ætlað virknum kórleiðarum; men harumframt er tað ynski kórsambandsins, at eisini onnur áhugað, helst ungfólk, skulu fáa høvi til at læra seg einfalda taktering og royna seg í tí at leiða eitt ljómlið, tað veri sær vokalt ella instrumentalt.

Innihaldið á skeiðinum verður lagað eftir, hvørjir luttakarar, ið melda seg; men í fyrsta lagi verður arbeitt við kórsatsum og kunnað um kórtilfar. Eisini er ætlanin, at tey luttakandi á hesum skeiði saman við skeiðleiðaranum skulu leggja ætlan um eina framhaldandi røð av skeiðum, sum fyri tey áhugaðu kundi endað við einum ummæli ella møguliga einari próvtøku.

Skeiðleiðari verður Mogens Dahl, sum bæði er dirigentur hjá Den Jyske Opera í Aarhus og lektari í kórleiðslu á Aalborg Universitet.

gult cyan magenta svart



# *Gjestal Nagano - Silja Superwash*



## jakki

| Størrelser: | | liten | middels | stor | |
|---|---|---|---|---|---|
| Overvidde: (plaggets mål) | Ca. | 105 | 115 | 125 | cm |
| Hel lengde: | Ca. | 54 | 56 | 58 | cm |
| Ermelengde: | Ca. | 47 | 48 | 49 | cm |

**MATERIALER: Gjestal Nagano (100% superwash ull ) eller Silja Superwash (80% superwash ull, 20% nylon) nøster à 50 g.**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| sort nr. 301 = bunnfargen | Ca. | 6 | 7 | 7 nøster |
| hvitt nr. 317 = mønsterfarge 1 | Ca. | 4 | 5 | 5 nøster |
| rødt nr 309 = mønsterfarge 2 | Ca. | 2 | 2 | 2 nøster |
| okergult nr. 318 = mønsterfarge 3 | Ca. | 1 | 1 | 1 nøste |

7 knapper art nr. 9475

**Pinner:** Rundp og strømpep nr. 2½ og 3 eller 3½. Liten rundp nr. 2½ til halsen.

**Vanlige forkortelser**
M=maske, r=rett, vr=vrang, str=strikk, p=pinne, omg=omgang, vr-bord=vrangbord, glattstr=glattstrikk, rettstr=rettstrikk, vrangbordstr=vrangbordstrikk, kantm=kantmaske, arb=arbeidet, beg=begynn, forts=fortsett, sm=sammen, g=gram.

**Strikkefasthet:** 26 m glattstrikk og mønster i bredden og 32 omg i høyden på p nr. 3 eller 3½ måler 10 x 10 cm. **Husk at strikkefastheten må holdes hvis resultatet skal bli vellykket.**

**DIAGRAMMENE VISER HVER MØNSTERRAPPORT I BREDDEN SOM GJENTAS**

**JAKKE**

**Bolen**

Legg opp 241-265-289 + 4 m som str vr på alle omg (til klippem under monteringen) med mønsterfarge 2 på rundp nr. 2½ og str 11 omg glattstr, 1 omg vr til brettekant, 1 omg glattstr og mønsterbord I etter diagrammet. Skift til rundp nr. 3 eller 3½ og bunnfargen. Str 2 omg glattstr samtidig som det på 2. omg økes ut til 273-299-325 m jevnt fordelt. Str videre mønster II etter diagrammet til arb måler ca. 34-35-36 cm og str mønsterbord III etter diagrammet. Fell 1 m på 1. omg til liten og øk 1 m til stor = 272-299-326 m (+ 4 klippem) i omg. Str mønster IV etter diagrammet til hel lengde. **Når** arb måler ca. 48-50-52 cm felles de 4 klippem midt foran samt 10-11-12 m til hver side av klippem og str videre frem og tilbake. Omg beg nå ved halsen. Fell videre på hver 2. p i hver side mot halsen med 3,2,2,1,1 m (likt for alle størrelser). Str til arb måler ca. 54-56-58 cm og fell de resterende m r av til en pen, jevn kant som ikke strammer.

**Ermene**

Legg opp 48-48-56 m med mønsterfarge 2 på strømpep nr. 2½ og str 11 omg glattstr, 1 omg vr til brettekant, 1 omg glattstr og mønsterbord I etter diagrammet. Skift til strømpep nr. 3 eller 3½ og bunnfargen. Str 2 omg glattstr samtidig som det på 2. omg økes til 70-72-74 m jevnt fordelt. Str videre mønster II etter diagrammet. Regn ut fra midten slik at mønsteret blir likt til hver side fra midten. Sett et merke midt under ermet ved omg beg og øk 1 m på hver side av merket hver 6. omg til det er **ca.** 116-120-122 m i omg. Str til arb måler **ca.** 45-46-47 cm, str 1 omg glattstr, mønsterbord III etter diagrammet og fortsett eventuelt med mønsterfarge 2 og glattstr til arb måler ca. 47-48-49 cm. Str 1 p r fra vrangen og 5 p glattstr til belegg. Fell av m til en pen, jevn kant som ikke strammer. Str det andre ermet likt.

**Montering og kanter**

Merk av i hver side til ermehull tilsvarende vidden øverst på ermene. Sy 2 maskinsømmer rundt hvert ermehull og på hver side av klippem foran. Klipp opp mellom sømmene. Sy eller mask sm på skuldrene. Sy i ermene og sy til belegget flatt over sårkanten på vrangen.

**Venstre stolpe:** Plukk eller str opp **ca.** 126-128-130 m med bunnfargen på p nr. 2½ og str 3 p glattstr, mønsterbord III etter diagrammet. Skift til mønsterfarge 2, 1 p vr fra retten til brettekant og 1 p glattstr. Skift til bunnfargen og str 7 p glattstr. Fell av m til en pen, jevn kant som ikke strammer.

**Høyre stolpe:** Str som venstre stolpe men med 6 knapphull jevnt fordelt etter 3. p ( det 7. knapphullet kommer i halskanten). Hvert knapphull lages ved å felle av 2 m som legges opp igjen på neste p. Husk knapphull etter brettekanten òg. Brett stolpene dobbelt mot vrangen og sy til med løse sting.

**Halskant:** Plukk eller str opp ca. 120-122-124 m med bunnfargen på p nr. 2½ og str kant som til stolpene. Str inn 1 knapphull etter 3. p rett over de øvrige knapphullene. Fell m løst av, brett kanten dobbelt mot vrangen og sy den til med løse sting. Fest alle løse tråder pent på vrangen. Sy i knapper og sy eventuelt rundt knapphullene.

*Press ikke arb, men legg eventuelt plagget flatt i fasong under fuktige håndklær og la det ligge til det er tørt.*

**Mønster: Se neste side!**







☐ = bunnfargen (sort)
☒ = mønsterfarge 1 (hvitt)
⊡ = mønsterfarge 2 (rødt)
◙ = mønsterfarge 3 (okergult)

DIAGRAMMET VISER HVER MØNSTERRAPPORT I BREDDEN SOM GJENTAS.

**Uppskriftin hesa vikuna**

Mønster II




Mønster I




☐ = bunnfargen (sort)
☒ = mønsterfargen (korallrødt/grått)


Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Sverrisgøta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 66 46